Spennandi boring í næstum:

# Risastór gasskelda millum Føroyar og Noreg

**Teir næstu mánaðirnar fara tvey av heimsins størstu oljufeløgum, Shell og BP at bora ein brunn heilt norðaliga á bretska landgrunninum, miðskeiðis millum Føroyar og Noreg. Hildið verður at eitt risastórt gassfelt goymir seg í undirgrundini har. Eitt møguligt fund her kann fáa týdning fyri framtíðar leiting við Føroyar**

OLJA

*Jan Müller*

Um somu tíð sum flestu eygu eru vend móti boringini hjá ENI í føroyskum øki verður nú seinasta hond løgd á fyrireikingarnar til at bora ein ikki minni spennandi brunn í bretskum øki. Ein brunn, sum eisini kann fáa stóran týdning fyri framtíðar leiting á føroyska landgrunninum, og her verður fyrst og fremst hugsað um økini har norð-




*Á kortinum síggja vit risastóra norska gassfeltið Ormen Lange og við Føroyar síggja vit eitt øki har norðuri, har eitt nú norski jarðfrøðingurin Terje Hagevang heldur møguleikar verða fyri at finna stórar mongdir av gassi. Miðskeiðis millum norska og føroyska økið fara BP og Shell nú at bora eftir tí tey halda er ein risastór gasskelda. Henda boringin kann fáa stóran týdning fyri framtíðar leiting við Føroyar og møguliga fyri komandi 2. útbjóðing.*

*Kelda Sagex*





*Vit síggja á kortinum kendu olju- og gassfeltini í bretskum og norskum øki. Pílurin vísur Ben Nevis strukturin har norðuri í bretskum øki miðskeiðis millum føroyska og norska markið.*

uri móti bretska og norska markinum.

Talan er um ein risastórur gassstrukturur, sum verður kallað Ben Nevis, ið er navnið á hægsta fjallinum í Skotlandi. So longu heitið á hesum komandi brunninum bendir á nakað stórt.

Tað eru BP og Shell, sum hava ábyrgdina av boringini, ið liggur í einum øki, har Statoil eisini hevur lisens. Seinastu tíðina hevur verið roynt at fáa onnur oljufeløg at vera við í boringina, tí talan er um ein rættiliga váðiligan brunn. Hann liggur í loyvinum 219/21 tvs. væl norðan fyri verandi oljufelt í bretskum øki. Hann er á Atlantsmótinum og rættiliga langt norðuri á bretska landgrunninum millum norska og føroyska markið, í einum øki, har lítið er borað áður. Í hvussu er er eingin framleiðsla har í nánd. Vit skulu suður til Magnus feltið fyri at finna eitt framleiðandi felt.

Borað verður í tíðarskeiðnum juli, august og september við tí framkomna Jack Bates bropipallinum, sum hevur staðið fyri fleiri leitibrunnum við føroyska markið.

Orsøkin til at hesin brunnurin eisini kann hava føroyskan áhuga er tann, at roknað verður við at gera eitt stórt gassfund í løgum, sum eisini finnast í norskum og føroyskum øki. Tað eru longu gjørd stór gassfund í norskum øki, eitt nú Ormen Lange, og hava serfrøðingar fyrr mett, at møguleikar eru fyri at gera slík gassfund í føroyskum øki eisini.

Bretska oljublaðið Uppstream umrøður Ben Nevis-strukturin sum "a monster".Blaðið skrivar, at her kunnu liggja goymd upp til 20 billiónir kubikkføtur av gassi ella svarandi til 7.8 Tcf. Brunnurin skal borast á 900 metra dýpi og verður borað 3000 metrar longur niður. Hann er mettur at kosta 170 mill. kr. Gass skal liggja í jarðfrøðiliga lagnum nevnt "cretaceous". Boringin fer at vara í einar tveir mánaðir. Seismikkurin vísir, at Ben Nevis líkist tí risastóra Ormen Lange strukturinum í norskum øki. Tað gassfeltið goymir sera stórar nøgdir av gassi. Hóast bjasrtskygni er stórt so ganga aðrar metingar út uppá, at talan kann vera um ein turran brunn tá avtornar.

Norski jarðfrøðingurin, Terje Hagevang, sum hevur stóran kunnleika til bæði norskt og føroyskt øki og sum eisini fylgur væl við í gongdini í bretskum øki sigur við Sosialin, at brunnurin, sum BP og Shell fara at bora í næstum er sera áhugaverdur.

Terje Hagevang sigur m.á. um hetta økið: "Det er en svært interessant brønn som skal bores til 3000 m på Ben Nevis strukturen i vanndyp på 910 m.Geologisk hører området til Færøy-plattformen, og har vulkanske intrusjoner (i dette tilfellet Brendan Dome), lava og samme letemodell (play model), dvs samme opprinnelse for hydrocarbonene, samme reservoarsander og fellemekanisme. Brønnen vil derfor gi mye relevant informasjon for å vurdere prospektiviteten til de nordlige områdene av færøysk sokkel som formodentlig blir inkludert i 2. runde."

Terje Hagevang var fyri nøkrum árum síðani leiðari fyri fyrireikingunum hjá norska oljufelagnum Saga Petroleum, sum ætlaði at vera við í leitingini á føroyska landgrunninum. Felagið varð tó keypt upp av øðrum feløgum, eitt nú Norsk Hydro, sum ikki fekk leitiloyvi við Føroyar í fyrstu rundu.

Herfyri umrøddi hann eitt møguligt stórt gassøki har norðuri á føroyska landgrunninum. (Sí gula økið á kortinum)



*Jack Bates skal bora Ben Nevis brunninn í næstum*




lærlingur til slaktara

MIKLAGARÐUR Í SMS SÓKNAST EFTIR EINUM ELLA TVEIMUM SLAKTARALÆRLINGUM AT BYRJA 1. AUGUST 2003

Í lærutíðini kemur tú at arbeiða hjá slaktarinum í Miklagarði í SMS og fært høvi at royna eitt sindur av hvørjum.

• Lærutíðin er 4 ár. Av hesum er 1 ár skúlagongd í Danmark.

Eitt lærupláss hjá slaktarinum gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari menning og tínir framtíðarmøguleikar eru fleiri.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn - innan 14. juli 2003 - við møguligum prógvum og tilmælum til Miklagarð. Tú kanst eisini seta teg í samband við Jørgen Jørgensen á tlf. 31 52 62, um tú vilt hava meira at vita um útbúgvingina.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1.700 fermetrar og við meira enn 10.000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*

*Sláturdeildin í Miklagarði er ein av størstu handilssláturdeildunum í danska kongaríkinum.*

MIKLAGARÐUR

SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

petur & petur - 320870